## Jón Rói kom á vøllin

Jón Rói Jacobsen var aftur at síggja á superligaliðnum hjá AaB í gjár. Jón Rói kom á vøllin seinastu minuttirnar av dystinum ímóti Viborg, tá ið AaB skuldi verja 1-0 leiðsluna. Viborg royndi at trýsta, men Jón Rói og teir hildu standa, og teir vunnu dystin 1-0. AaB er nú 9 stig frammanfyri næstfremsta liðið í superliguni, men FCK, sum spælir í kvøld, kann koma eitt stig nærri enn hini liðini, um teir vinna sín dyst.



## Bayern er meistari

Hóast tað eru trý umfør eftir at spæla í týsku bundesliguni, er tað greitt, at FC Bayern úr Munchen er týskur meistari. Bayern spældi í gjár javnleiki ímóti Wolfsburg, og tað var nóg mikið til at tryggja liðnum meistaraheitið. Bayern, sum i farnu viku tapti stórt í hálvfinaluni í UEFA Cup, vísti einki serligt spæl í gjár, men teir fingu tað stigið, sum teir høvdu brúk fyri. Hetta er 21. meistaraheitið, sum týska stórfelagið vinnur.

# Vakur fimleikur á Hálsi

**Um vikuskiftið vórðu FM-finalurnar í estetiskum fimleiki avgreiddar**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin var talan um B-kappingarnar, sum eru eitt tiltrongt ískoyti til breiddina innan fimleikin. Áhugin fyri at vera partur av liðunum í estetiskum fimleiki er sera stórur, og tí er talan nú eisini um B-kappingar, sum bert kunnu vera við til at styrkja heimliga fimleikin.

Bæði leygar- og sunnudagin vóru A-finalur eisini á skránni. Hjá kvinnum gjørdist tað í ár Havnar Fimleikafelag, sum streyk avstað við gullinum í ævigu kappingini við Støkk. Hinvegin megnaði Støkk at taka gullið í kvinnuunglingum og gentum, so alt bendir á, at talan eisini komandi árini verður um knallharða kapping millum tey bæði feløgini. Og við gullinum í kappingin ifyri smágentur prógvaði Ljósið, at eisini tey vilja vera við til at bjóða teimum báðum stóru av.



Talan er um framúr flottar sýningar, tá estetiskur fimleikur er á skránni

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Eisini verður nógv gjørt burtur úr búnunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Unglingar**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| HF | 4,05 | 2,90 | 8,45 | 15,40 |
| Støkk | 3,95 | 2,80 | 8,25 | 15,00 |

**Unglingar**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Støkk | 3,65 | 2,45 | 7,60 | 13,70 |
| HF | 3,65 | 2,35 | 7,55 | 13,55 |
| Ljósið | 3,25 | 2,50 | 7,40 | 13,15 |

**Gentur**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Støkk | 5,20 | 2,90 | 7,70 | 15,80 |
| HF | 5,10 | 2,97 | 7,60 | 15,67 |

**Smágentur**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Ljósið | 5,20 | 2,60 | 7,15 | 14,95 |
| Støkk | 5,00 | 2,20 | 7,00 | 14,20 |
| Hfa | 4,55 | 2,35 | 7,05 | 13,95 |
| HFb | 4,15 | 1,65 | 6,40 | 12,20 |

**Pinkur**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Hfa | 4,50 | 2,50 | 7,60 | 14,60 |
| Støkk | 4,50 | 2,73 | 7,10 | 14,33 |
| Ljósið | 3,70 | 2,10 | 6,65 | 12,45 |

**B-kappingin**

**Pinkur**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| HF | 3,35 | 2,20 | 6,45 | 12,00 |
| Støkk | 3,65 | 1,80 | 6,25 | 11,70 |
| Flog | 3,20 | 1,57 | 6,10 | 10,87 |

**Gentur**

| | T | L | F | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Flog | 3,55 | 2,50 | 6,75 | 12,80 |
| HF | 3,00 | 1,63 | 6,10 | 10,73 |

# Olaf Berg vann Grand Prix'ið

**Eftir níggju umfør við hópin av spennandi dystum endaði Olaf Berg fremstur í Grand Prix-kappingini í talvi**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá avtornaði varð Olaf ein hampuliga tryggur sigursharri. Munurin niður til Ólav Simonsen á øðrum plássi gjørdist fimm stig.

Undan finaluna sum varð telvað leygardagin í hølunum hjá Havnar Telvingarfelag, hevði Olaf eina leiðslu uppá trý stig til argasta kappingarneytan, Ólav Simonsen úr Klaksvíkar Talvfelag. Olaf Berg var tó eirindaleysur í finaluumfarinum, og tað eydnaðist honum eisini at økja um munin við tveimum stigum.

22 telvarar møttu til finaluna. Teirra millum IM Helgi Dam Ziska, sum annars als ikki hevur verið við í kappingini. Níggjur umfør vórðu telvd, og hevur vunnu Olaf og Helgi sær hvør síni 7,5 stig. Innanhýsis talvið teirra millum endaði við javnleiki.

Umframt sjálva Grand Prix-kappingina, vóru serstakar Grand Prix-styrkisvirðislønir lætnar. Her vann Rógvi Egilstoft Nielsen úr Sandavági fyrstu virðisløn. Hinar fóru til Jónfinn Thomsen úr Sandavági, Høgna Egilstoft Nielsen úr Sandavági og Johan Hentze úr Havnar Telvingarfelagi.

Sostatt gjørdist Sandavágs Talvfelag tann heilt stóri sigursharrin. Felagið gjørdi eitt satt hál, nú teir vunnu fimm av sjey møguligum plaseringum.

Styrkisvirðislønirnar vunnu Arnbjørn Ó. Dalsgarð, Heiðrikur T. Jacobsen, báðir úr Havnar Telvingarfelag og Heðin Gregersen úr Klaksvíkar Talvfelag.



*Ólavur Simonsen (nr. 3) sæst her saman við IM Helga Dam Ziska og Olaf Berg, sum vóru javnir á fyrsta plássinum í seinsta Grand Prix-umfarinum*

**Grand Prix-kappingin**

**Endaligt úrslit**

| Nr. | Telvari | Felag | Rating | GP1 | GP2 | GP3 | GP4 | GP5 | GP6 | GP7 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Olaf Berg | ST | 2175 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 7,0 | 2,0 | 5,3 | 7,0 |
| 2 | Ólavur Simonsen | KTF | 2084 | 6,0 | 5,3 | 7,0 | 2,5 | 0,0 | 0,0 | 4,5 |
| 3 | Torkil Nielsen | ST | 2045 | 0,0 | 0,0 | 4,5 | 4,5 | 5,0 | 5,3 | 0,8 |
| 4 | Finnbjørn Vang | KTF | 2086 | 6,0 | 5,3 | 0,3 | 2,5 | 2,0 | 0,0 | 0,0 |